# Sleppa undan varandi meini

**Teir báðir kokkarnir, sum brendu seg illa í spreingingini á Hotel Hafnia leygardagin, hava fingið at vita, at teir koma væl frá ólukkuni**

Randi Jacobsen

Tað má kallst eitt undur, at ikki fleiri fólk fingu álvarsligan skaða av spreingingini á Hotel Hafnia leygardagin.

Nógv fólk vóru til arbeiðis, tá tað hendi, og fleiri fólk høvdu eina løtu frammanundan staðið har beint við.

Skaðin gekk út yvir tveir kokkar, sum brendu seg illa. Annar brendist nokkso illa í andlitinum ogá ørmunum. Hin var ikki so illa brendur.

Báðir hava fingið at vita frá læknunum, at teir ikki fáa varandi mein.



*Farið varð beinanvegin undir at umvæla skaðarnar á Hafnia, sum ætlar at lata matstovuna upp aftur í morgin*



*Hurðin út í gongina klovnaði*

# El-neisti festi í

**Staðfest er nú, at ein neisti frá einum ovni hevur fest í gassið, sum lak upp úr gólvinum**

Randi Jacobsen

Eftir spreingingina á Hotel Hafnia leygardagin, fóru kriminalpolitiið og Arbeiðseftirlitið á staðið fyri at lýsa, hvat hendi.

– Sum tað var sagt beinanvegin, hava vit staðfest, at ein leiki hevur verið í gasskipanini. Ein ovnur stóð beint við, og ein neisti hevur so fest í, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá politinum.

Hann heldur, at øll eiga at vera fegin um, at ikki meira hendi. Fleiri fólk vóru til arbeiðis, men av tilvild vóru bara kokkarnir beint við.

Í køkinum var ein stór kókioyggj, gassblussini vóru frá, men har hendi einki, tí oyggin var eitt gott petti frá lekanum.

Bresturin hevur verið øgiligur, tí ein hurð klovnaði, og ein stórur rútur út móti Áarvegnum fór í knús.

Eingin hevur varnast gassið, sum lak út úr rørinum, tí nógvur matarroykur var. Gassið er eisini tyngri enn luft, og gassið kann tí breiða seg langt, áðrenn nakar fær illgruna.

Stutta løtu eftir óhappið fingu sløkkiliðið og politiið í felag øll fólkini út úr húsinum, og sløkkiliðið tryggjaði, at ikki meira hendi.



*Trýstið hevur verið øðiligt. Køkurin er á ovaru síðani, og kortini brotnaði ein stórur rútur út móti Áarvegnum*


*Menninir, sum brendust, vorðu beinanvegin fluttir á Landssjúkrahúsið*

# Fingu nógva hjálp

**Hóast hinar matstovurnar í Havn høvdu ríkiligt at gera leygardagin, rættu bæði tær og onnur Hotel Hafnia eina hjálpandi hond**

Randi Jacobsen

Leygardagurin var tann heilt stóri jólaborðsdagurin, og tað kundi tí ikki verið meira óheppið, at spreingingin á Hotel Hafnia hendi júst henda dagin.

Umframt egið borðhald og at skula lata mat út av húsinum til fleiri arbeiðspláss og onnur, stóð Hotel Hafnia fyri at gera mat til 350 fólk í høllini hjá Dansifrøði.

Knappliga bar ikki til at gera mat í køkinum.

Men óhappið var ikki meira enn hent, so var hópur av fólki til reiðar at hjálpa.

**Nógv bjóðaðu seg fram**

Fleiri av starvsfólkunum á Hafnia høvdu fingið slíkan hvøkk, at tey ikki orkaðu at arbiða meira tann dagin, men tað komu so nógv onnur og bjóðaðu seg fram.

Allar matstovurnar í býnum hjálptu til við einum og øðrum, og onkur, sum ikki er í starvi sum kokkur nú, átók sær at steikja kjøt til ta stóru veitsluna í Gundadali.

Hinar matstovurnar hjálptu bæði við matgerð, fólki og læntu Hafnia útgerð og vørur. Syrgst varð fyri, at tey, sum gistu á Hafnia, fingu eina máltíð leygarkvøldið, og sunnumorgunin og mánamorgunin fingu tey morgunmat á eini aðrari matstovu í býnum.

Sosialurin hevur tosað við fleiri teirra, sum hjálptu til. Eingin teirra hevur hug at stíga fram, tí í teirra verð er tað ein sjálvfylgja at hjálpa har, sum á stendur.